# Lesnaður á esperanto

**Fólk flest, ið læra seg esperanto, gera tað við samskifti í hyggju, men tað eru eisini mong, ið læra seg málið helst við tí í huga at kunna lesa tær fjølbroyttu og ríku bókmentirnar, sum har eru at finna úr øllum heimsins ættum.**

Esperanto er uttanveltað mál og umboðar eins væl allar mentanir, har ið tað verður nýtt. Esperanto umboðar sostatt eitt egið málsamfelag við egnum og fjølbroyttum mentanarheimi, ið letur eins væl dyrnar upp til eitt nú ungarskar, brasilskar, japanskar, kinverskar sum enskar, týskar og franskar bókmentir - umframt bókmentir, sum upprunaliga eru skrivaðar á esperanto, runnar av hesum sama fjølbroytninum.

Kannar tú eftir, finnur tú, at nógv tær flestu týðingarnar til tjóðmál um okkara leiðir hava enskan uppruna. Týðingar eitt nú eystaneftir eru haraftur-ímóti upp á seg rættiliga sjáldsamar her. Tílíkur ójavni er ikki í esperantoheimi: týðingar og upprunaligar bókmentir á esperanto eru úr øllum heimspørtum. Tilsamans um leið 30.000 bind finnast nú á esperanto.

Danski esperanto-bókahandilin Libroservo, <Libroservo@esperanto.dk> (Ib Sunekær, Højlundshusene 16, DK-3500 Værløse), hevur um leið 300 bøkur á goymslu og kann lættliga útvega næstan hvørja esperantobók, tað skal vera. Har finnast høvundar sum Bertold Brecht, Cervantes, Chu Chan-yeh, Dante, Hamsun, Henrik Ibsen, Omar Khayyam, Astrid Lindgren, Lorca, de Sade, Shakespeare, Nevil Shute, Tolkien, og almangir aðrir.

Aðrir størri esperanto-bókahandlar eru, t.d. http://www.uea.org/katalogo/ við 1000-tals bókarheitum.

Eitt hitt mest fjølbroytta tíðarritið á esperanto man vera mánaðarritið MONATO, sum verður útgivið í Belgia; ábyrgdarblaðstjórin býr í Týsklandi, undirblaðstjórar í Belgia, Brasil, Eysturríki, Finnlandi, Hálandi, Japan, Noregi, Onglandi, Russlandi, USA.

La Revuservo de DEA, c/o Frederik Eriksen, Finsensgade 10, DK-4800 Nykøbing F. - Telf. 40532506 <frederikeriksen@post.cybercity.dk> - umboðar 11 esperanto-tíðarrit, millum onnur KOMENCANTO til teirra, ið byrja at læra seg esperanto, 100 kr, kemur út 8 ferðir um árið - og JUNA AMIKO til ung og børn, ið byrja at læra seg málið, 28 blaðsíður 4 ferðir um árið, 85 kr.

Esperanto er so mikið lætt at læra, at tú sum áður nevnt fært hylling á tí við sjálvlesnaði á teimum trimum blaðsíðunum í føroyska orðalistanum, Esperantobókini II (bls. 8-10), men betri venjing fæst við eisini at lesa læribókina, Esperantobókin. Báðar eru í varðveitslu á Bókamiðsøluni og kunnu fáast um allar bókahandlar. Framhaldandi venjing í at nýta málið kann t.d. vera við vanligum brævaskifti ella við teldupostsambandi. Stutt skeið eru javnan í øllum grannalondum okkara m.a. sum ymisk háskúlaskeið. Eisini finnast brævskúlar, t.d. Dansk Esperanto-Institut, Stenbrydervej 6, Værløse, DK-4640 Fakse; telf. 56714651; <brevskole@esperanto.dk> - 4 skeið á ymiskum stigum, 300 kr hvørt.

Og nýliga er útkomið eitt sjónbandað skeið, alt á esperanto, sum tú skilur so hvørt sum tú hyggur at tí: "Esperanto, pasporto al la tuta mondo", 2 sjónbond við 4 tímum hvørt, frá Flandra Esperanto-Ligo, Frankrijklei 140, B-2000 Antwerpen; <butiko@fel.esperanto.be> - hvørt bandið 81 evrur umframt postgjald.

Lesið eisini um esperanto í 45. bindi av Varðanum, bls. 99, og í Máltingi 1991 nr. 1. Upplýsing fæst eisini t.d. á heimasíðuni http://esperanto.dk/. - Til esperantistar er eitt frálíkt internetmið á www.esperanto.net/veb

»Hjá tí, ið veit, hvat esperanto hevur í sær, er ómoralskt ikki at bera tað víðari« (Leo Tolstoy).

(Niðurlagt)

*Jeffrei Henriksen*

Arkiv Rediger Vis Meddelelse Format Funktioner Vindue Help 10:30 Outlook Express

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Indbakke

Frá: Jógvan Hugo Gardar, gardar@oslo.online.no

**TELDUBRÆVIÐ**

Dagur 16.04.2001

Til: eirikur@sosialurin.fo

Evni: Vikuskifti

# Bygt vinarlag i sjeyti ár

Týsdagin vóru sjeyti ár síðani eitt av elstu vinarfeløgunum í Norðanlondum varð sett á stovn. Tann 24. apríl 1931 hittust seks menn í Nordahl Bruns gate 22 í Oslo. Málið teir høvdu sett sær var at seta á stovn eitt felag, hvørs endamál var »å fremme det kulturelle samarbeidet mellom Færøyene og Norge«, sum tað stendur skrivað í frágreiðingini frá fundinum.

Teir seks sum hittust vóru Nikolaus Gjelsvik, doktari; Einar Breidsvoll, blaðstjóri; Fredrik Scheel, ríkisskjalavørur; Ernst Sondum, ekspeditør; Edvard Os, kapteynur og Erik Presterud, loytnantur. Á stovnandi fundinum luttóku níggju onnur, millum hesi var dokatri í bókmentum Fredrik Paasche. Hann bleiv valdur til fyrsta formannin í nýggja felagnum, sum fekk navnið Norsk-Færøysk Lag.

Fáir føroyingar vóru fastbúgvandi ella gingu á skúla í norska høvuðsstaðnum hesi árini, men tveir føroyingar luttóku á stovnandi fundinum. Teir vóru Ernst Sondum og Eivind Isholm. Báðir arbeiddu á Oslo-blaðnum »Tidens Tegn« (bleiv seinni til Verdens Gang, sum í dag er størsta dagblað í Noregi). Blaðstjórin á hesum blaðnum, Rolf Thommessen, hevði stóran áhuga fyri føroyskum viðurskiftum og luttók eisini á fundinum. Ernst sondum kom inn í fyrstu nevndina, men hvørki hann ella Eivind Isholm blivu verandi í Oslo. Boð vóru aftir teimum heima í Føroyum, og nøkur ár seinni bleiv Ernst Sondum fyrsti blaðstjórin á Dagblaðnum. Eivind Isholm tók yvir sum blaðstjóri á Tingakrossi eftir faðirin.

Áhugin fyri Føroyum, Íslandi og Grønlandi hevði í nøkur ár verið stórur millum fólk í Noregi. Meðan áhugin fyri Grønlandi seinni í tríatiárunum gjørdist til eina tøku av landnyrðingspartinum av Grønlandi, so var áhugi fyri Føroyum meir á tí andaliga støðinum. Noreg royndi at gera ein part av Grønlandi til sítt hjáland við millum annað at gera Helge Ingstad til sýslumann í ísoyðinum. Sami Ingstad, sum doyði fyri fáum vikum síðani, fann saman við konu síni leivdirnar eftir víkingunum í Canada. Á tann hátt prógvaðu tey bondini millum norðurlond og norður-amerika. Í Norsk-Færøysk Lag vóru eisini fleiri av teimum, sum arbeiddu fyri at gera ein part av Grønlandi til norskt hjáland. Hetta sæst millum annað í fundarfrágreiðingunum tey fyrstu árini, har Grønlandsspurningurin javnan verður nevndur. Man vísir til sín stuðul og hevur annars javnan upplýsningar um gongdina í Grønlandsmálinum.

Áhugin fyri Føroyum var meir á tí andaliga og mentanarliga støðinum. Tjóðskaparrørslan í Føroyum hevði sínar stuðlar í Noregi. Ikki løgi, tí Noreg gjørdist sjálvstøðugt í 1905, so tey flestu tilkomnu mintust tíðina, tá norðmenn gjørdust ein fræls tjóð. Eisini vísti tað seg, at serliga innan norsku nýnorsk-málrørsluna var áhugin fyri Føroyum stórur. Heldur ikki hetta var so løgi. Stríðið millum norska bókmálið, sum liggur nær donskum, og nýnorskt, sum liggur nærri norrønum og føroyskum, hevur leingi staðið á. Í Føroyum funnu nýnorsktfólkini eitt líknandi stríð millum føroyskt og danskt. Um rættindi til at brúka sítt móðurmál í kirkju, á fundum ella í skúlanum var nakað hesar rørslur kundu stuðla stríðnum hjá hvør øðrum í tríatiárunum.

Nýnorsk-fólk kendu seg væl millum føroyingar, og leingi mintu tey hvønn annan á ferðir til Føroyar, millum annað ta stóru norrønu stevnuna í Kirkjubø í 1911. Eisini bleiv eitt Føroyskt-Norskt Felag sett á stovn stutt undan Norsk-Færøysk Lag. Har var Jóannes bóndi (Patursson) formaður ta fyrstu tíðna. Hann hevði nógv vinfólk í Noregi og dugdi at halda sambandi við hesi. Millum tey sum hittu Jóannes var Per Hovda. Hann gjørdist seinni formaður tvær ferðir í Norsk-Færøysk Lag – seinast fyrst í áttatiárunum.

Norsk-Færøysk Lag fór í dvala, tá seinni heimsbardagi brast á. Hesi árini vóru tað einstaklingar sum royndu at upplýsa um Føroyar í Noregi og ikki minst at vísa norskum myndugleikum á, at tað liggur ein tjóð handan hav sum er nærmasti granni. Hetta arbeiðið gav javnan úrslit. Millum annað bleiv borgarstjórin í Havn bjóðaður til 900 ára føðingardegin hjá Oslo í 1950 – á jøvnum føti við aðrar borgarstjórar í høvuðsstøðum.

Í 1954 bleiv Norsk-Færøysk Lag endurreist við kendum mentanarpersónum sum Tønnes Andenæs ið var bókmentamaður og Sverre Stove, sum skrivaði hópin av greinum um Føroyar í norskum tíðarritum.

Síðani 1954 hevur Norsk-Færøysk Lag verið virkið uttan íhald. Felagið skipar fyri millum seks og 12 tiltøkum um árið. Í sjeytiárunum kendu føroyingarnir seg settar nakað til síðis og skipaðu tí millum annað fyri eini egnari Kvøldsetu, har bert føroyingar sluppu inn, og serliga innbjóðir norðmenn.

Norsk-Færøysk Lag hevur øll árini havt sum endamál at upplýsa um Føroyar í Noregi. Hetta ger felagið ólíkt einum vanligum føroyingafelag, sum hevur sum endamál at savna føroyingar til veitslur og annan hugna. Norsk-Færøysk Lag hevur eisini veitslur og samkomur fyri limirnar, ið eru javnt býttir millum norðmenn og føroyingar. Álíkavæl hevur tað, eins og tey fyrstu árini í felagnum, hesi seinnu árini verið roynt at gera meir við upplýsingum út í norska samfelagið. Felagið roynir at hjálpa einstaklingum og bólkum við upplýsningum um Føroyar, hjálpir til við at leggja til rættis ferðir til Føroyar, luttaka í kjaksendingum í útvarpi og sjónvarpi, og so skipar felagið fyri kjakfundum og upplýsandi fundum um føroysk viðurskifti – bæði innan mentan og politikk.




Føroya Handilsskúli søkir eftir

## LÆRARUM og TÍMALÆRARUM

frá 1. august 2001 ella eftir nærri avtalu. Hevur umsøkjari útbúgving í lærugreinum, sum nøkta tørv skúlans, kann talan verða um fast starv.

**Tórshavn**

**FHS**:
Virkisbúskapur á C-stigi (8 t/v), Týskt á stigi E/C ( 8 t/v), Fiskivinna (6 t/v), Marknaðarførsla (4 t/v), Samfelagslæru (8 t/v), Støddfrøði D/C (8 t/v), Kunningartøkni (8 t/v), dekoratión (3-6 t/v), Spanskt (4 t/v) og Føroyskt (16 t/v).

**HH**:
Føroyskt (8 t/v), Fyriskipan (4 t/v), Sølubúskapur (8/v), Støddfrøði (4 t/v), Fiskivinna (3 t/v), Samtíðarsøga (12 t/v), Altjóða búskapur (5 t/v), Vinnulívsrættur (6 t/v), Danskt (15 t/v) og Týskt (8 t/v).

**Kambsdalur**

**FHS**:
Dekoratión (3 t/v), Kunningartøkni C (4 t/v), Marknaðarførsla C (4 t/v), Samfelagslæra C (4 t/v), Spanskt E (5 t/v), Støddfrøði C (4 t/v) og Týskt E/C (8 t/v).

**HH**:
Altjóða búskapur A (10 t/v), Danskt B/A (12 t/v), Enskt B (8 t/v), Føroyskt B/A (12 t/v), Kunningar-tøkni B/A (8 t/v), Marknaðarførsla A (4 t/v), Sálarfrøði C (4 t/v), Samtíðarsøga (8 t/v), Sølubúskapur B/A (13 t/v), Støddfrøði B/A (20 t/v), Týskt C (8 t/v) og Vinnulívsrættur C (9 t/v).

Barnsburðaravloysara til uml. 1. mars 2002:
Týskt B (4 t/v) og Enskt A (10 t/v).

**Førleikakrøv:**
Prógv frá handilsháskúla, lærdum háskúla, handilsfaklæraraprógv ella onnur við øðrum fortreytum. Umsøkjarar við vinnuroyndum hava fyrimun.

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð. Tann, sum settur verður í fast starv, má vera til reiðar skjótast gjørligt at fara undir kravda náms-frøðilga útbúgving. Lærarar, sum settir verða í fast starv, mugu rokna við í ávísan mun at skula undirvísa á fleiri stigum og partvís um kvøldið gerst tað neyðugt.

**Løn:**
Í lønarrensli 13/21/24, 18/26/29, 16/21/29/31 hjá HL ella eftir avtalu.

**Leyst at søkja:**
25. apríl 2001. Galdandi til 10. mai 2001.
Umsóknin skal sendast skúlanum, sum umsøkjarin ætlar at starvast

**Umsókn fast starv:**
Umsókn við ljósprentum av próvskjølum o.ø., skulu stílast til Føroya Handilsskúla, stýrið og sendast antin til Føroya Handilsskúla í Tórshavn, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177 ella Føroya Handilsskúla á Kambsdali 530 Fuglafjørður og verða skúlanum í hendi 10. mai 2001. Umsóknarblað fæst á skúlanum.

**Umsókn tímalærari:**
Umsókn við ljósprentum av próvskjølum o.ø., skulu stílast til Føroya Handilsskúla, stýrið og sendast antin til Føroya Handilsskúla í Tórshavn, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177 ella Føroya Handilsskúla á Kambsdali 530 Fuglafjørður og verða skúlanum í hendi 10. mai 2001. Umsóknarblað fæst á skúlanum.

*Á Føroya Handilsskúla fevnir frálæran um FHS-støðisár, Hægri Handilsskúla, stakroyndir, Merkonom, Datanom, Teldustøðingaútbúgving, HD 1. part, peningastovnaskúli og útboðin/umbiðin skeið.*

FØROYA HANDILSSKÚLI



## Eysturoyingar & Norðstreymoyingar

**IRF byrjar við øktari skiljing í Eysturoynni og Norðstreymoynni. Vanliga ruski í húsarhaldinum skal býtast í tríggjar posar.**

**Tann grái posin,**
skal brúkast til ruski, sum skal brennast.
Posin verður heintaður hvørja viku.

**Tann hvíti posin,**
skal brúkast til pappír og papp.
Posin verður heintaður fimtu hvørja viku.
Lýst verður í fjølmiðlunum.

**Tann grøni posin,**
skal brúkast til serliga dálkandi burturkast.
Posin verður heintaður tvær ferðir um árið.
Lýst verður í fjølmiðlunum.

IRF



## Kursus i isländska och Islands kultur sommaren 2001

**Nybörjarkurs 1.–14. juli**

Program: 4 timmars språkundervisning varje morgon
Eftermiddagarna ägnas åt föredrag om Islands kultur och samhälle, samt studiebesök.
Weekendresa till historiska/sagatrakter
Undervisningen sker på nordiska språk

Deltalgare: Kurserna vänder sig i första hand till besökande nordiska turister

Deltagarantal: Max. 18

Kursavgift: DKR. 3.000
Deltagarna bekostar resa och uppehåll själv
Nordens hus kan arrangera inkvartering

Anmälan: På särskild blankett som rekvireras från Nordens hus eller på hemsidan <http://www.nordice.is>

För närmare information kontakta språkkonsulent **Kristín Jóhannesdóttir**, tel. +354 551 70 30, fax. +354 552 6476, e-post: kristinj@nordice.is



BýIN
- HVøNN HóSDAG